# Mál- og avrikssáttmáli millum

# Viðgerðarheimið Heilbrigdi og Heilsumálaráðið

# 2012

## 1. Missión og visión

### Missión:

Viðgerðarheimið Heilbrigdi hevur til endamáls at virka sum viðgerðarstaður fyri rúsevnismisnýtarar.

### Visión:

Endamálið við viðgerðarheiminum Heilbrigdi á Velbastað er at vera viðgerðarstaður fyri rúsevnismissnýtarar. Viðgjørt verður sambært teimum 12 stigunum hjá AA, eisini kallað Minnisota-viðgerðin. Hetta gerst best við at knýta familjuviðgerð afturat verandi viðgerð í nýggjum hóskandi hølum og undir hóskandi umstøðum.
Til tess at røkka málinum er alneyðugt at styrkja og stimbra fakliga grundarlagið hjá øllum, sum starvast í Heilbrigdi.

### Fyri at røkka visiónini, skal Viðgerðarheimið Heilbrigdi:

- Altíð hava dagførda viðgerð
- Støðugt at menna stovnin
- Helst røkka øllum tørvandi misnýtaraum og familjum teirra
- Veita skjóta og fullgóða viðgerð
- Støðugt eftirmeta úrslitini

## 2. Inngangur:

Viðgerðarheimið Heilbrigdi varð settur á stovn í 1986, og verður virksemið fíggjað við eini rakstrarjáttan, ið verður latin stovninum við løgtingsfíggjarlógini.

## 3. Fíggjar- og starvsfólkaviðurskifti:

Fíggjarjáttanin til Viðgerðarheimið Heilbrigdi í 2012 er (gott 5 mió. kr.). Fíggjarætlan verður løgd við ársbyrjan, so játtanin heldur alt árið.

Við støði í fíggjar- og starvsfólkaorkuni hjá Viðgerðarheiminum Heilbrigdi, verður løgd ein ætlan fyri, hvat verður raðfest í árinum.

Viðgerðarheimið Heilbrigdi hevur 10,5 ársverk.

Viðgerðarheimið Heilbrigdi avgreiðir øll sín fíggjarviðurskifti umvegis búskaparskipan landsins.

## 4. Kjarnuøki

### Viðgerðarheimið Heilbrigdi hevur hetta kjarnuøki:

1. At vera viðgerðarstaður fyri rúsevnismissnýtarar og øll teirra avvarðandi.

### Kjarnuøki umfatar:

- Tænasta til øll sløg av avrúsing og viðgerð
  - alkohol
  - alkohol og tablettir
  - alkohol, tablettir og hash
  - alkohol, tablettir, hash og narkotisk evni

## 5. Serligar verkætlanir í 2012

Viðgerðarheimið Heilbrigdi hevur í umbúnað at úbúgva og eftirútbúgva 2,5 ráðgevarar. Eisini er ætlanin at hava 4 eftirmetingar-vikuskifti fyri sjúklingar, sum vóru í viðgerð í 2011.

## 6. Mál og tiltøk fyri 2012

| **Endamál** | **Støða** | **Mál í 2012** | **Tiltøk/Avrik** |
|---|---|---|---|
| At fíggjarætlanin verður løgd við ársbyrjan, so játtanin heldur alt árið. | Er í lagi | | Fylgja væl við, og tillaga virksemið. |
| Skráseting av bókhaldsskjølum | Er í gongd | Gera eftirmeting | |
| Roknskaparreglugerð | Eingin roknskaparreglugerð er gjørd. | At gera eina roknskaparreglugerð fyri Viðgerðarheimið Heilbrigdi, sum er týðulig og greitt lýsir øll viðurskifti um roknskaparhaldið hjá | Miðja verður eftir, at roknskaparreglugerðin verður liðug og góðkend í 2012. |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | stovninum. | |
| Serligar verkætlanir | | Sí viðmerking undir 5 | |

**Virksemistøl**

| Ár | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|---|
| Innleggingar | 110 | 108 | 107 | 100 |
| Dagar | 2.758 | 2.833 | 2.803 | 2.800 |
| Dagar pr. innl. | 25 | 26 | 26 | 28 |

**Sáttmálaskeið**

Hesin sáttmálin er galdandi fyri árið 2012.
Eftirmeting verður gjørd saman við aðalstjóranum í Heilsumálaráðnum á heysti 2012.

Tórshavn, tann 07.06. 2012

Viðgerðarheimið Heilbrigdi

Árni Rein, stovnsleiðari

Heilsumálaráðið

Poul Geert Hansen, aðalstjóri